## Hugskot væl umtókt

Hugskotið hjá Elini Heinesen at brúka gomlu radarstøðina á Sornfelli til eitt »ævintýrslott« tykist fáa góða undirtøku. Kent Christensen, ferðavinnumaður, heldur, at hugskotið um at gera eina upplivingarmiðstøð á Sornfelli er frálíkt, og at staðið er væl egnað at selja Føroyar við sum ferðamannaland. Eisini Jóannes Eidesgaard, løgmaður, tekur undir við hugskotinum. Alt ber til, um politiskur vilji er til staðar, sigur løgmaður við Útvarpið.

## Hugnakvøld í Leirvík

24. mars skipar Felagskórið Gøta/Leirvík fyri spennandi hugnakvøldi í bygdarhúsinum í Leirvík. Skráin byrjar við sjálvtøkuborði við øllum tí, sum til hoyrir, og síðani fara Felagskórið Gøta/Leirvík, Tórshavnar Manskór, Tór Verland Johansen at undirhalda við sangi og tónleiki. Kl. 23 verður dansur við Flemmingi Petersen. Atgongumerki til hugnakvøldið fáast á Statoilstøðini í Leirvík, PW í Gøtu ella á telefon 272714 ella 219570.

# akuliga norðureftir



*Fagraberg kemur í kvøld á Fuglafjørð við fullari last av svartkjafti, og sum skilst á Havsbrún, eru fleiri skip nú um at verða fullfermd*

torvurnar uppaftur.

Hitin í sjónum spælir eisini inn.

Svartkjafturin kemur nú spakuliga norðureftir og fyrsta lastin, sum Havsbrún keypti úr føroyskum sjógvi í fjør, var 11. apríl.

Í løtuni fer meginparturin av veiðini fram á leiðunum suður úr Rock All.

Havsbrún hevur eisini keypt onkra last frá útlendskum skipum í vetur.

Fleiri lond eru nú liðug at fiska kvotuna í ES-sjógvi, og eitt nú donsku skipini koma hendanvegin aftur, tá svartkjafturin kemur í føroyskan sjógv.

Eftir at íslendsk skip herfyri vórðu liðug við lodnuna, eru teirra skip eisini farin á svartkjaftaveiði.

Hóast stór svartkjaftaveiða hevur verið á leiðunum sunnanfyri higartil í ár, hevur Havsbrún keypt umleið 4.000 tons færri enn somu tíð í fjør.

Virkið í Fuglafiði er soleiðis í kapping við onnur virki um svartkjaftin.

Av samlaðu nøgdunum, sum Havsbrún hevur tikið ímóti higartil í ár, eru einans 120 lodna og nakað er keypt av brislingi.

### Óvanligt

Úr Fuglafirði verður sagt, at árið í ár higartil hevur verið sum vanligt hevur verið undanfarin ár. Men eitt, sum hendi í ár, og sum ikki er vanligt, er, at skipini fingu nógvan svartkjaft í gráu leiðini sunnanfyri í januar.

Tað er ikki so vanligt.

Vanligt er, at svartkjafturin tekur seg upp á leiðunum vestur úr Írlandi umleið 20. januar, men í ár hendi so tað, at væl av svartkjafti fekst norðari longu í januar.



## Uppskot um nýggjan bátahyl í Leirvík

**Í fíggjarætlanini fyri 2007 hevur Leirvíkar kommuna sett 7 mió krónur av til bátahyl á Toftanesi**

BÁTAHYLUR
*Vilmund Jacobsen*
vlmund@sosialurin.fo

Leirvíkar kommuna er farin undir fyrireikingararbeiði at byggja nýggjan bátahyl á Toftanesi í Leirvík.

Sp/f Selmar Nielsen, arkitektur og P/F LBF, sum er nýggja navnið hjá Landsbyggifelagnum, hava gjørt nøkur uppskot um nýggjan bátahyl.

Kommunan hevur í hyggju at arbeiða víðari við uppskotinum, sum myndin sýnir.

- Bátahylurin er ein partur av eini heildarætlan fyri havnaøkið og miðstaðarøkið, sigur kommunan á síni heimasíðu.

Í Leirvík vóna tey, at arbeiðið at byggja bátahylin kann byrja sum skjótast, og á fíggjarætlanini fyri 2007 hevur kommunan sett 6 mió krónur av til ætlaða bátahylin.

- Uppskotið um bátahyl leggur upp til, at økið við bátahylin, økið niðan fyri kirkjuna og miðstaðarøkið út eftir Kulibakka, verða ein heild, sigur Leirvíkar kommuna.

# týdningin av starvsfólkarøkt

Meðan Malan vegleiðir um kropsburð, stól, teldu, mús og skrivstovuborðið annars, mýkir Anna Maria vøddar, um fólk longu eru fongd við spenningum og pínu í kroppinum.

Anna Maria og Malan eru onga løtu í iva um, at besta íløgan hjá eini fyritøku er ein íløga í starvsfólkið.

- Ein fyritøka, sum røkir síni starvsfólk við at fyribyrgja spenningum og skaðum, økir um lívsvirðið, hevur nøgdari og minni strongd starvsfólk við øktum neyvleika og færri sjúkradøgum. Tí bjóða vit okkum at vitja út á arbeiðsplássini við okkara førleikum og tænastu, sigur tær báðar.

Millum fyritøkurnar, sum ásanna týdningin av starvsfólkarøkt og hava vent sær til tær báðar um vegleiðing og viðgerð, er Sosialurin.

Klassiska massasjan hjá Onnu Mariu er ein samanrenning av mýking og strúking, sum betrar virkisføri, linnar pínu og avspennir vøddarnar. Hon virkar sissandi, avstressandi og hevur góða ávirkan á nervaskipanina. Massasjan styrkir kropsverjuna og kann lækka blóðtrýstið, samstundis sum hon stimbrar lymfurenslið og økir um blóðstreymin í vøddunum.

Hetta er ein náttúrligur viðgerðarháttur ímóti strongd og spenningum, sum mong dragast við.

Mensendieck-fimleikur er individuellur fimleikur, sum fær kroppin í javnvág. Næmingarnir fáa frálæru í vøddum, liðbondum og teirra virki og gerast soleiðis meira tilvitaðir um kroppin. Mensendieck-lærarin dugir at síggja, hvør tørvur er á venjing og hvar, soleiðis at kroppurin kemur í javnvág, samstundis sum heildin alla tíðina er við. Vitanin verður sitandi í kroppinum, og dagligar rørslur verða »umsettar« til fimleik. Kroppurin verður sterkari, fimari og rørslurnar gerast fríari.

Fimleikurin er góður, um tú eitt nú hevur trupulleikar við rygginum, músaskaðar, høvuðpínu ella diskusprolaps, men hann er eisini góður, um tú bara ynskir tær eina størri smidligheit og vælveru.

### FAKTA

Tær vóru grannar, barndómsvinkonur og floksfelagar.

Anna Maria hevur arbeitt í ferðavinnuni og Malan, sum er útbúgvin radiografur, hevur arbeitt á røntgendeildini á LS.

Báðar eru farnar undir heilt annað yrki við heilsu, trivnaði og vælveru.

Anna Maria er útbúgvin massørur (2005/ 2006), og Malan er útbúgvin mensendieck-lærari (1999) og er serkøn í kropsburði.

Nú veita tær skrivstovufólki felags tænastu við vegleiðing um kropsburð og við mýking